# Gunnar skal venja hoyvíkarkvinnur

H71 hevur sett Gunnar Streymoy sum venjara hjá besta kvinnuliði felagsins. Tað er serliga á manssíðuni, at H71 hevur gjørt um seg, men seinnu árini er kvinnulið felagsins eisini ment nógv. Talan er fyri tað nógva um ungar spælarar, og ætlanin er, at hesar um ikki so nógv ár kunnu seta sín dám á Sunset-kappingina.



# Atgongumerki eru enn eftir

FSF endar í dag forsøluna av atgongumerkjum til landsdystirnar móti Italia og Skotlandi. At byrja við tóktist nærum vist, at Italia-dysturin fór at verða útseldur í forsølu, men enn eru atgongumerki eftir. – Onkur virki, sum høvdu keypt nógv atgongumerki, hava nú latið nøkur av hesum innaftur, og tí er framvegis gjørligt at fáa atgongumerki. Móti Skotlandi eru eisini atgongumerki eftir. Har hava vit tó selt eini 800 til skotar, men vónandi fáa hesir eisini mótspæl frá føroyskum áskoðarum, tá dysturin verður spældir, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari hjá FSF.



*Heili 106 næmingar úr skúlunum í Sunda kommunu tóku lut í talvkapping, sum var í Avhaldshúsinum í Haldórsvík mikudagin. Hetta var sostatt eisini størsta einstaklingakappingin í føroyskari talvsøgu.*

*Mynd: Jóhan Magnus Joensen*

# Størsta einstaklinga-kapping nakrantíð

**Størsta einstaklingakappingin í føroyskari talvsøgu nakrantíð var mikudagin í Avhaldshúsinum í Haldórsvík, tá 106 skúlanæmingur úr skúlunum í Sunda kommunu brustu saman**

TALV
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Gongdin í føroyskari telving hevur ikki verið tann allarbesta síðstu árini. Áhugin millum ungdómin hevur verið minkandi, tí unglingin í Føroyum ofta velur at halda seg til stórar ítróttagreinar sum fótbólt, hondbólt o.a.

Úrslitini hjá bestu telvarunum hava tó verið góð. Helgi Dam Ziska hevur sum næsti føroyingurin nakrantíð tryggjað sær ein IM-norm, og úrslitini í kappingum úti í heimi hava heldur ikki verið so galin hjá føroyskum telvarum.

Hetta tykist hava sett síni fótaspor millum føroyska ungdómin, tí áhugin tykist bara at vaksa millum skúlanæmingar í landinum.

Mikudagin fór eisini størsta einstaklingakappingin í føroyskari talvsøgu nakrantíð av bakkastokki í Avhaldshúsinum í Haldórsvík, tá 106 skúlanæmingar frá skúlunum í Sunda kommunu settust við talvborðini.

Vit hava tikið eitt prát við ein av samskiparunum, Jóhan Magnus Joensen, sum er lærari í Tjørnuvíkar skúla.

### Hava telvað í tvey ár

Jóhan Magnus Joensen hevur sjálvur telvað nakað ígjøgnum tíðirnar, men nú situr hann mest á internetinum, har hann stríðist við aðrar internetspælarar á teimum 64 puntunum.

Hann hevur tó ikki bert hildið seg til telvingina á netinum. Hann hevur nevniliga eisini fingist við at lært børnini í Tjørnuvíkar og Haldórsvíkar skúla at telva, og síðstu tvey árini hava næmingarnir á hesum skúlum tikið seg nógv fram innan talvyrkið.

Børn í hinum skúlunum í Sunda kommunu eru eisini byrjaði at telva, og luttakaratalið í kappingini í Avhaldshúsinum vísir, at áhugin er stórur millum ungdómin í Sundalagnum.

- Einki er at ivast í, at áhugin er stóru millum børnini her norðuri. Kappingin mikudagin er størsta einstaklinga kapping í landinum nakrantíð, og av teimum knapt 200 næmingunum, sum ganga í skúlunum í Sundalagnum, vóru næstan 110 næmingar við í Haldórsvík, og hetta vísir, at børnini tíma at telvað, sigur Jóhan Magnus.

### Kollfirðingur hevur hjálpt til

Síðani kommunurnar í Sundalagnum løgdu saman í eina stóru kommunu, hevur nýggja Sunda kommunu lagt upp til, at skúlarnir í økinum skulu samstarva. Júst talvundirvísingin er ein liður í hesum samstarvið, og hetta hevur jú gingið væl.

Tað hevur tó eisini hjálpt, at børnini hava fingið undirvísing frá einum av sterkastu telvarunum í landinum. Kollfirðingurin, Hans Kristjan Simonsen, hevur nevniliga ferðast runt á skúlunum í Sundalagnum eina ferð um vikuna síðstu mánaðirnar, har hann hevur undirvíst børnunum í talvi.

- Sunda kommuna hevur sett Hans Kristjan at feraðst runt í ymsu skúlunum ein dag um vikuna, og tað hevur heilt víst bøtt um áhugan millum børnini, at tey hava fingið undirvísing frá einum av elitutelvarunum í landinum. Eg haldi tað eisini vera gott, at føroyskir telvarar hava áhuga í slíkum, tí hetta økir samstundis um áhugan ímillum ungdómin, heldur Jóhan Magnus.

### Góð úrslit

Tá kappingin var komin at enda mikudagin, fingu trý tey bestu í hvørjum flokki heiðursmerki. Harafturat fekk vinnarin eitt ferðasteyp við navninum á, so fólk kunnu síggja, hvør hevur vunnið steypið upp ígjøgnum árini.

Haldórsvíkar skúli og Tjørnuvíkar skúli hava fyri fyrstu ferð tikið lut í FM í skúlatelving í ár, meðan Norðskála/Oyra skúli eisini hevur tikið lut. Jóhan Magnus er eisini nøgdur við góðu úrslitini, sum allir tríggir skúlarnir hava fingið í skúlatelvingini.

Hann leggur afturat, at talv eisini hjálpir uppá undirvísingina í skúlunum, tí við telving læra børnini eisini at konsentrera seg í øðrum lærugreinum í skúlanum.

At enda vónar hann, at aðrir skúla kring landið kunnu taka við hesum hugskotinum, sum skúlarnir í Sunda kommunu nýta í sambandi við skúlatelving.

# Skúla FM í frælsum ítrótti

FÍF og ítróttaráðgevin á LMS skipa í felag fyri kapping um føroyameistaraheitið í Frælsum ítrótti fyr skúlar á Svangaskarið mánadagin 28 Mai. Fyrstu kappingar fara í gongd kl. 12.00 og tann seinasta ferð í gongd kl. 16.50.

Kappast verður í sprint (60, 80 ella 100 m), miðteina renning (600 ella 800 m), longdarlop og kúlustoyt. Tey yngru renna styttri og nýta lættari kúlur enn tey eldru. Kappingin er skipað soleiðis, at ein føroyameistari skal finnast innan hvørja grein í hvørjum árgangi (flokki) fyri ávikast gentur og dreingir. Sostatt skulu 80 føroyameistara finnast.

Tíggju skúlar hava melda næmingar til tiltakið við upp til 64 luttakandi. Samlaða talið av startandi er 248. Her er tó ikki tikið atlit til at onkur luttekur í fleiri greinum. Tó kann ongin einstakur íðkari luttaka í meir enn 4 greinum.

Kappingin er stuðla av Atlantic Airways og Tryggingarfelagnum Føroyar.

# Svimja um Nólsoyarfjørð í morgin

Vanliga hevur stuðulssvimjingin um Nólsoyarfjørð verið skipað á ovastevnu, sum er annað vikuskiftið eftir ólavsøku. Í ár er kappingin tó framskundað, og sum eyka krydd eru tveir teinar at svimja hesaferð. Til ber at tekna seg til vanliga teinin, har byrjað verður við hølini hjá radioamatørunum í Havn – tann teinurin er 4.000 metrar – ella at tekna seg til styttra teinin, har byrjað verður út fyri bygdina, soleiðis at "bert" ein kilometur er at svimja.

Fyri at fáa alt at ganga sum best og at tryggja okkum at trygdin er í lagi, møtast øll hjá radioamatørunum kl. 11.00. Har verður kunnað um hvussu skipað verður fyri og aðrar fráboðanir, ið skulu til. Svimjingin á longra teininum byrjar klokkan 12. Tey, ið svimja styttra teinin, byrja klokkan 12.30.

Málið hjá báðum bólkum er Heiðursportrið niðri á keiuni í Nolsoy. Um svimjari kemur á land aðrastaðni, er neyðugt at renna seinasta teinin. Samarittar eru við á ferðini um fjørðin, at ansa eftir, og nólsoyingar taka ímóti og hjálpa svimjarunum, tá komið er upp á land.

Hetta er tíggjunda ferðin, at skipað verður fyri stuðulsvimjing. Bestu tíðina higartil eigur Jóannes á Fløtti, sum í 2004 svam teinin upp á 1 tíma, 17 minuttir og 7 sekund.